# P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag

Skrás.nr. 5758

# Ársfrásøgn fyri 2016

**Avrit**

# Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| Upplýsingar um felagið | 2 |
| Yvirlit yvir samtakið | 3 |
| Leiðslufrágreiðing | 4-10 |
| Leiðsluátekning | 11 |
| Átekning frá óheftum grannskoðarum | 12-13 |
| Nýttur roknskaparháttur | 14-16 |
| Rakstrarroknskapur | 17 |
| Fíggjarstøða | 18-19 |
| Frágreiðing um eginogn | 20 |
| Notur | 21-28 |

**FELAGIÐ**

P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag
Kopargøta 1,
Postsmoga 206
FO-100 Tórshavn
Skrásetingarnr. 5758
Heimstaður: Tórshavn kommuna
5. roknskaparár

**NEVND**

Finn Danberg, nevndarformaður
Gunnleyg Árnafjall, næstforkvinna
Kári Petersen

**STJÓRN**

Jan Jakobsen, stjóri

**AKTUARUR**

Jan Buschardt, cand. act., ábyrgdarhavandi aktuarur

**TRYGGINGARLÆKNI**

Høgni Debes Joensen, læknaráðgevi

**GRANNSKOÐAN**

JANUAR, løggilt grannskoðanarvirki P/F

# Yvirlit yvir samtakið



**HØVUÐSVIRKSEMI**

P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag umsitur tær tryggingar í LÍV-samtakinum, sum eru teknaðar frá byrjan og inntil 1. januar 2000, sum hava landskassa-veðhald. Felagið teknar ikki nýggjar tryggingar.

Felagið varð stovnað tann 28. juni 2012 við afturvirkandi gildi til 1. januar 2012.

Av tí at felagið helt uppat at gera nýggjar kundaavtalur 31. desember 1999, er felagið at meta sum eitt avtøkufelag. Fyri at fáa hetta skipað á ein tryggan og skipaðan hátt, legði Føroya Landsstýri fram lógaruppskot fyri Føroya Løgting í 2015. Lógin varð samtykt av einum samdum Løgtingi tann 29. apríl 2015.

Felagið er framhaldandi undir eftirliti av Tryggingareftirlitinum. Felagið er ikki longur undir ræði av P/F LÍV Holding og er tískil ikki longur at meta sum ein partur av LÍV- samtakinum.

Móðirfelagið eigur tvey dótturfeløg. Talan er um P/F Royndina og P/F Fastogn.

Úrslitið
Samtakið hevði í 2016 eitt tryggingartekniskt hall upp á 109 mió.kr. í mun til eitt avlop upp á 102 mió.kr. í 2015. Ársúrslitið eftir skatt gjørdist eitt hall upp á 113 mió.kr. hjá samtakinum í mun til eitt avlop upp á 98,9 mió. kr í 2015.

Úrslitið er neyvt tengt at avsetingunum hjá felagnum, sum eru grundaðar á rentugongdina. Rentan er lækkað lutfalsliga nógv í 2016. Hetta sæst beinleiðis aftur í hækkandi avsetingum og í úrslitinum hjá samtakinum.

Inngjald.
- Tilsamans vóru inngoldnar 42,4 mió.kr. í tryggingargjøldum í 2016 í mun til 48,1 mió.kr. í 2015.

- Av tí at ongar nýggjar eftirlønaravtalur verða gjørdar í felagnum kann væntast, at inngjaldið verður fallandi komandi árini.

Útgjald í árinum
- Samtakið hevur útgoldið tilsamans góðar 107 mió.kr. í mun til 104 mió.kr. í 2015. Útgjaldið fer at verða vaksandi komandi árini. Størsti parturin av útgjaldinum eru eingangsútgjøld í sambandi við, at fólk náa eftirlønaraldur.
- Av samlaðu útgjøldunum stava góðar 93 mió.kr. frá eftirlønarútgjøldum, meðan restin er útgjøld í sambandi við tryggingar.

Rakstrarkostnaður
- Rakstrarkostnaðurin hjá samtakinum var 7,9 mió.kr. í mun til 8,9 mió.kr. í 2015. Lækkingin er serliga grundað í, at kostnaðir í sambandi við umleggingina av felagnum eru lækkaðir í 2016.
- Rakstrarkostnaðurin svarar til 0,25% av avsetingunum í mun til 0,3% í 2015. Felagið arbeiðir áhaldandi við at lækka rakstrarkostnaðin hjá felagnum.

Íløguavkast
- Samtakið hevur fingið 78 mió.kr. í samlaðum avkasti av íløguognunum í mun til 20,7 mió.kr. í 2015.
- Íløgukostnaðurin er framhaldandi á einum lágum støði. Samlaði íløgukostnaðurin hjá samtakinum er 0,42% av samlaðu íløguognunum í mun til 0,47% fyri 2015.

Eftirlønaruppsparingin
- Samlaðu íløguaktivini í samtakinum vóru við árslok 2016 2,35 mia.kr. í mun til 2,34 mia.kr. í 2015. Komandi árini fara íløguognirnar væntandi at lækka grundað í hækkandi útgjøldum og lækkandi inngjøldum.
- Avsetingarnar eru hækkaðar við 113,9 mió.kr. Hetta er serliga grundað í lækkandi rentunum. Tað eru í stóran mun broytingarnar í avsetingunum, sum eru avgerandi fyri úrslitið hjá felagnum.

**ÁRIÐ 2016 – GONGDIN Í VIRKSEMI OG FÍGGJARLIGU VIÐURSKIFTUNUM**

Niðanfyri eru lýst nøkur týðandi viðurskifti hjá samtakinum í árinum:
*1. januar 2016:*
Tvungna eftirlønargjaldið, sum ætlandi skuldi upp á 3% hækkaði ikki sum ætlað. Í sambandi við fíggjarætlanina hjá Føroya Løgtingi varð avgjørt ikki at hækka tvungna inngjaldið.

*30. september 2016:*
Sølan av LÍV-samtøkunum verður endaliga avgreidd á móttøku, har eitt samtak av 17 fakfeløgum keypa upp til 50% av partapeninginum í Lív Holding, meðan Ognarfelagið LÍV fær tillutað 50%.

*10. oktober 2016:*
50 ár eru liðin síðani Føroya Løgting samtykti løgtingslóg nr. 64 frá 10. oktober 1966 um lívstryggingarvirksemi. Lógin varð sett í verk 1. januar 1967.

*11. november 2016:*
Tryggingareftirlitið boðar í skrivi frá nýggjum benchmark fyri livitíðarfortreytir. Hetta verður gjørt í sambandi við at livialdurin støðugt hækkar. Nýggju ásetingarnar byggja á somu fortreytir, sum danska Fíggjareftirlitið hevur ásett. Tó skulu føroysku feløgini hækka livialdurin fyri mannfólk við 0,8 árum og fyri konufólk við 1,5 árum. Tryggingareftirlitið hevur somuleiðis sent uppskot um nýggja solvenskunngerð til hoyringar.

*10. desember 2016:*
Freistin at stilla upp til umboðsráðið hjá Ognarfelagnum LÍV, eftir at Ognarfelagið LÍV hevði fingið tillutað 50% av partapeninginum í P/F LÍV Holding er lokin. Tilsamans vóru 52 persónar uppstillaðir.

*1. januar 2017:*
Eftirlønarlógin frá 2014 leggur upp til at tvungna eftirlønargjaldið skal hækka frá 1% upp til 15% eftir 15 árum. Frá 1. januar 2017 hækkar tvungna eftirlønarinngjaldið frá 2% upp á 3%.

**Tryggingarvirksemi**

Tryggingargjøldini vóru í árinum 42,4 mió.kr. í mun til 48,1 mió.kr. í 2015.

Tryggingargjøldini fara at verða fallandi komandi árini, grundað á, at ongar nýggjar eftirlønaravtalur verða gjørdar í felagnum. Felagið hevur ikki havt nýtekningar av tryggingum eftir 1. januar 2000.

Í 2016 vóru samlaðu útgjøldini av veitingum góðar 107 mió.kr. Av samlaðu útgjøldunum stava góðar 93 mió.kr. frá útgjaldi í sambandi við eftirlønaraldur. Av restini stavar meginparturin frá tryggingarútgjøldum (lívstryggingar og útgjøld til avlamisveitingar v.m.) og afturkeypi av eftirlønum.

Lívstryggingaravsetingarnar eru tætt knýttar at rentubroytingunum á fíggjarmarknaðunum. Samanumtikið hækkaðu samlaðu lívstryggingaravsetingarnar fyri 2016 við 113,9 mió.kr. Uppgerðarrentan er lækkað lutfalsliga nógv í 2016. Hækkingin í avsetingunum er høvuðsgrundin til hallið hjá samtakinum í 2016.

**Fíggjarvirksemi**

Samtakið hevði við árslok 2016 tilsamans 2,353 mia.kr. í íløguognum. Tað er ein øking á 14 mió. kr. í mun til árslok 2015.

Avkastið er partvíst tengt at rentugongdini og gongdini á partabrævamarknaðinum. Íløguavkastið varð í 2016 íalt 78 mió.kr. í mun til 20,7 mió.kr. í 2015.

Í almenna kjakinum verður ofta ført fram, at føroysk eftirlønaruppsparing ikki er virkin í Føroyum. Samtakið hevur gjørt íløgur í føroyska samfelagið fyri tilsamans umleið 25% av samlaðu skrásettu ognunum.

Felagið førir ein varnan íløgupolitik. Við árslok 2016 vóru góð 70% av íløguognum samtaksins gjørdar í lánsbrøv, almenn útlán ella onnur lánsbrøv. 27% av íløgunum hjá móðirfelagnum vóru við ársenda í 2016 gjørd í partabrøv í mun til góð 23% í 2015.

Íløgupolitikkur felagsins er at spjaða íløgurnar, soleiðis at felagið ikki verður so hart rakt, um ein íløguflokkur ikki gevur nøktandi avkast. Ein lýsing av íløguognunum sæst í notu 15 - 16.

2016 var avbjóðandi á íløguøkinum á fleiri økjum.

Tað eru serliga tvær yvirskriftir, sum hava gingið aftur í 2016. Fyrra er bretska fólkaavkvøðan um ES limaskapin. Sum kunnugt varð niðurstøðan frá fólkaatkvøðuni, at Bretland er farið undir eina skipaða tilgongd um at fara úr Evropiska Samveldinum.

Seinna yvirskriftin var tað amerikanska forsetavalið, har Trump sum kunnugt gjørdist sigursharri.

Árið byrjaði við ógvisligum lækkingum á partabrævamarkaðinum og stórari órógv á gjaldoyramarknaðinum.

Partabrøvini byrjaðu at koma fyri seg miðskeiðis í árinum og við ársenda 2016 høvdu tey givið eitt positivt avkast.

Rentan hevur samanumtikið verið lækkandi fram til seinasta ársfjórðing í 2016. Í seinasta ársfjórðingi byrjaðu renturnar at hækka, men samanumtikið liggja rentunar umleið 0,5% lægri við ársenda. At renturnar eru byrjaðar at hækka eru tekin um, at marknaðurin væntar, at búskapurin er í einari jaligari gongd og at sannlíkindi eru fyri hækkandi prísstøði.

Eisini hava OPEC londini avtalað at lækka oljuframleiðsluna. Hetta hevur stuðlað uppundir hækkandi oljuprísir í 2016. Brentoljan lág á uml. 34$ við ársbyrjan og endaði uppi á umleið 57$ við ársenda.

Samanumtikið eru partabrøvini hækkaði í 2016. Gongdin í DAX vísutalinum sæst niðanfyri.




Sìðan ársbyrjan 2016 eru renturnar lækkaðar lutfalsliga nógv fram móti 3. ársfjórðingi. 20 ára rentan varð við ársbyrjan 1,89% . Gongdin er lýst niðanfyri har tað eisini sæst, at 20 ára rentan byrjaði at hækka aftur í 3. ársfjórðingi og varð við árslok 1,44%




Lækkandi renturnar hava eina jaliga ávirkan á avkastið á lánsbrøvunum. Hinvegin eru avsetingarnar til miðalrentutryggingar hækkaðar munandi grundað á lækkandi rentuna.

Lága rentustøðið er ein av stóru avbjóðingunum hjá pensjónsfeløgunum um allan heim. Grundað á lága rentustøðið kann tí væntast eitt lutfalsliga avmarkað avkast á eftirlønaruppsparingina komandi árini. Lága rentustøðið hevur kortini avmarkað prísleguna í samfelagnum. Hetta merkir, at eftirlønaruppsparingin liggur omanfyri verandi inflasjón.

**P/F Royndin**

Royndin varð stovnað í 2005. Endamálið við at seta á stovn Royndina var, at felagið sum framtaksfelag, skuldi gera langskygdar íløgur í fyrst og fremst føroyskt vinnuvirksemi við avkasti fyri eyga og samstundis stimbra føroyskar fyritøkur at mennast og vaksa.

Rakstrarúrslitið hjá Royndini gjørdist í árinum eitt hall áðrenn skatt uppá 13,1 mió.kr. Felagið hevur í 2016 niðurskrivað virðisbrøv við 11,5 mió.kr. Meginparturin av hesum reguleringum er kursregulering av virðisbrøvum í fyritøkum, sum í eina tíð hava verið og framvegis eru ávirkaðar av lágum virksemi og prísum í oljuídnaðinum.

**P/F Fastogn**

Endamálið hjá felagnum er at eiga og reka fasta ogn. Leiguinntøkurnar hjá felagnum vóru í árinum 23,7 mió.kr., sum er nakað minni enn í 2016, tá leiguinntøkurnar vóru 25,4 mió.kr. Úrslitið áðrenn rentur og virðisjavnan av íløguognum gjørdist 25,5 mió.kr. ímóti 22,7 mió.kr. í 2015.

Ársúrslitið áðrenn skatt fyri 2016 varð eitt yvirskot uppá 8,3 mió.kr. og eftir skatt eitt yvirskot uppá 6,3 mió.kr. Fíggjarstøðan hjá felagnum javnvigar við 366,5 mió.kr. Av hesum er eginpeningurin 178,5 mió.kr. Felagið hevur ein solvens uppá góð 48%.

**Solvensstøða**

Kapitalkrav og avsetingar verða gjørd upp sambært ásetingunum í Tryggingarlógini (løgtingslóg um tryggingarvirksemi) og í kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 við seinni broytingum.

Við broyting í omanfyri nevndu kunngerð við virknaði fyri roknskaparárið 2012, varð ikki longur heimild til at upptaka landskassaveðhaldið í roknskapin. Lága rentustøðið á fíggjarmarknaðinum hevur við sær, at lívstryggingaravsetingarnar eru hægri enn íløguognirnar.

Tá ið landskassaveðhaldið ikki kann takast við í roknskapin, grundað á broyttu roknskaparreglurnar, merkir hetta, at eginognin er negativ.

Kapitalviðurskiftini í felagnum eftir broytingina í áðurnevndu roknskaparkunngerð eru eisini beinleiðis grundin til, at løgtingið samtykti løgtingslóg nr. 85/2014 um P/F LÍV, lívs- og pensiónstryggingarfelag 29. apríl 2015.

Um allir tryggingartakarar skuldu ynskt at fingið sínar tryggingar útgoldnar 31. desember 2016, kann útgangsstøði takast í retrospektiva virðinum á tryggingarligu avsetingunum (uppgjørt til grundarlagsrentu), sum er eitt roknað virðið á afturkeypunum.

Hetta er lýst í talvuni niðanfyri.

| | |
|---|---|
| Íløguognir | 2.081.899 |
| Retrospektivar avsetingar | 2.059.074 |
| Avlop | 22.825 |

**VÁÐASTÝRING**

Felagið er ávirkað av fleiri váðum. Hesir váðar eru í høvuðsheitum fíggjarligir, tryggingarligir, operationellir og handilsligir. Nevndin ger karmar fyri stýring av váðunum í samtakinum, meðan leiðslan hevur ábyrgdina av, at karmarnir verða hildnir.

Felagið hevur sett í verk eina skipan, har allir týðandi váðar verða eyðmerktir, og kapitalkrav verður gjørt upp til at standa ímóti hesum váðum. Um stórar broytingar eru í mun til seinastu uppgerð, skal støða takast til, um meira kapitalur skal setast av til hesar váðar.

**Fíggjarligir váðar**

Marknaðarváðin er váðin fyri, at virðið á aktivunum ella skyldunum hjá felagnum broytist vegna rentu- og/ella kursbroyting v.m. Gjaldførisváðin er vandin fyri tapi, ið stendst av tørvinum fyri gjaldføri innan stutta tíðarfreist fyri at halda gjaldskyldur felagsins.

Mótpartsváðin er váðin fyri tapi orsakað av, at mótpartar ikki halda sínar skyldur. Vantandi spjaðing kann hava tap við sær, um íløgur í ov stóran mun eru bundnar í ávísar vinnur ella marknaðir o.s.fr.

Fyri P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelagið er marknaðarváðin nógv tann størsti fíggjarligi váðin, og tann váðin, har størsti parturin av fæfeingiskravinum stendst av. Hesin váði verður m.a. avmarkaður við at tryggja hóskandi karmar fyri rentuváða fyri lánsbrøv saman við møguligum avdekningi av rentuváða. Somuleiðis eru íløgurnar í partabrøv varisligar.

Marknaðarváðin er undir neyvum eftirliti. Felagið ger m.a. hvønn ársfjórðing stresstestir av váðanum, og felagið ger kvartárliga upp fæfeingiskravið, har ognir og skyldur verða váðamettar.

Rentuváðin er tann størsti váðin fyri felagið. Tá lívstryggingaravsetingarnar verða gjørdar upp til eina marknaðarrentu, er ein munandi rentuváði fyri eginognina.

Gjaldførisváðin verður avmarkaður við, at munandi partar av íløgunum eru í likvidum, børsskrásettum virðisbrøvum.

Mótpartsváðin verður avmarkaður við, at ein stórur partur av íløguognunum er settur í stats- og realkredittlánsbrøv. Spjaðingarváðin er avmarkaður við at spjaða íløgur felagsins í ymsar vinnur og marknaðir og við at avmarka íløgur við sama útgevara.

**Tryggingarligir váðar**

Tryggingarligu váðarnir viðvíkja gongdini í deyðstíttleika, avlamnistíttleika, hættisligari sjúku v.m. Eitt nú økir hækkandi livialdur veitingar felagsins til eftirlønir, meðan talið á andlátum og sjúkrameldingum ávirka veitingar í sambandi við deyða og sjúku. Av hesum er mest týðandi váðin livialdur. Felagið er í gongd við at eftirkanna handfaringina av livialdri.

Spjaðingarváði í sambandi við tryggingarligar váðar fevnir um vandan fyri tapi vegna ov stórar einstakar kundabólkar og einstakar tryggingar.

Felagið hevur avmarkað tryggingarligu váðarnar við at spjaða tryggingarmongdina millum nógvar ymiskar kundabólkar, fakfeløg o.fl. og við endurtrygging.

**Operationellir váðar**

Operationellir váðar fevna um váða fyri tapi vegna feilir í KT-skipanum, løgfrøðiligar ósemjur, ikki nøktandi ella skeivar mannagongdir ella svik. Felagið avmarkar operationellan váða við funktiónsskilnaði og innaneftirliti, sum støðugt verður endurskoðað og dagført.

Kvartárliga verða allir operationellir váðar gjøgnumgingnir, og øll møgulig tap verða skrásett og fráboðað til leiðsluna.

**Handilsligir váðar**

Handilsligir váðar fevna um strategiskar váðar, váðar fyri umdømi og aðrar váðar við tilknýti til uttanhýsis ávirkanir. Felagið fylgir neyvt við gongdini á marknaðinum fyri at tryggja, at prísir og tænastustig eru á kappingarførum stigi. Stórur dentur verður lagdur á góða kundatænastu umframt opinleika og gjøgnumskygni í samskiftinum við viðskiftafólk. Arbeitt verður áhaldandi við at betra um hesi viðurskifti.

**VITANARSTIG**

Felagið leggur stóran dent á, at vitanin hjá starvsfólkum felagsins er á høgum fakligum støði, soleiðis at viðskiftafólk fáa góða ráðgeving.

Starvsfólkini hava í stóran mun tryggingarliga ella fíggjarliga útbúgving. Starvsfólkini fáa støðugt hóskandi eftirútbúgving innan sítt virkisøki.

**ETISK FYRILIT**

Íløguvirksemið felagsins verður skipað soleiðis, at málið um hægst møguligt avkast verður rokkið, samstundis sum fyrilit verður havt fyri, at íløgurnar eru etiskt og sosialt ráðiligar.

Tann størsti parturin av íløgum felagsins verður umsitin av íløgurøktarum uttanfyri felagið. Í avtalum við íløgurøktararnar verður ásett, at dentur áhaldandi skal leggjast á at halda grundleggjandi mannarættindi. Høvuðsmálið er, at ILO-sáttmálin verður hildin, um ikki at misnýta barnaarbeiði, ikki at gera nýtslu av tvingsilsarbeiði, ikki at gera mismun millum kyn á arbeiðsplássum og at virða felagafrælsið.

Á heimasíðu felagsins (www.liv.fo) er listi til skjals, sum vísir, hvørjum feløgum LÍV-samtakið hevði íløgur í við seinasta árslok. Eisini finst samlaði íløgukarmurin fyri felagið har.

**HENDINGAR EFTIR ROKNSKAPARLOK**

Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag er einki hent, sum eftir leiðslunnar áskoðan hevur týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

**ÚTLIT FYRI 2017**

**Tryggingarvirksemi**

Av tí, at ongar nýggjar avtalur vera gjørdar í felagnum, fer tryggingarvirksemi felagsins at vera minkandi, tí alsamt fleiri viðskiftafólk hjá felagnum náa eftirlønaraldur.

Tískil fer henda frágongd at síggjast aftur í lækkandi inngjøldum og øktum útgjøldum komandi árini, og henda gongd fer væntandi eisini at merkjast í 2017.

**Fíggjarvirksemi**

Felagið hevur eina neyva stýring av íløguvirkseminum. Roknast kann við, at tað framvegis valda stórar óvissur á fíggjarmarknaðinum í 2017.

Lága rentustøðið ger fíggjarmarknaðin lutfalsliga ótryggan. Eisini ger lága rentustøðið, at avkastið av lánsbrævapartinum kann koma undir trýst í 2017. Tí fer felagið eisini í 2017 at arbeiða við alternativum hættum at optimera avkastið hjá viðskiftafólkum felagsins.

Um búskaparstøðan í heiminum batnar, eru útlit til, at renturnar kunnu hækka. Hetta kann hava neiliga ávirkan á avkastið av lánsbrøvum í 2017. Hinvegin hava hækkandi rentur jaliga ávirkan á lívstryggingarligu avsetingarnar hjá felagnum. Samanumtikið vil ein rentuhækking vera góð fyri felagið.

Ein møguligur búskaparvøkstur kann hinvegin væntast at hava framhaldandi jaliga ávirkan á partabrævakursirnar, sum hava víst eina góða gongd seinastu árini.

Felagið heldur eitt vakið eyga við gongdini við atliti til at taka neyðug stig í sambandi við møguligar broytingar á fíggjarmarknaðinum.

# Seinastu 5 árini

**Høvuðstøl (t.DKK) - samtakið**

| | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | | | | | |
| Tryggingargjøld | 38.939 | 44.538 | 42.095 | 48.960 | 53.474 |
| Útgoldnar veitingar | -106.145 | -98.370 | -111.714 | -76.089 | -142.258 |
| Úrslit av íløguvirksemi | 77.988 | 20.697 | 127.566 | 63.722 | 163.286 |
| Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi | -7.868 | -8.923 | -9.499 | -8.621 | -16.071 |
| Úrslit av endurtrygging | -477 | -2.665 | -1.771 | -528 | -1.494 |
| Tryggingartekniskt úrslit | -109.211 | 102.331 | 440.190 | 348.056 | -243.933 |
| Ársúrslit | -112.968 | 98.864 | -500.232 | 310.069 | -237.560 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur tilsamans | 3.101.968 | 2.988.533 | 3.124.801 | 2.574.770 | 2.882.194 |
| Eginogn tilsamans | -1.025.347 | -912.379 | -1.027.171 | -526.940 | -837.009 |
| Aktiv tilsamans | 2.371.899 | 2.362.361 | 2.410.132 | 2.376.982 | 2.406.578 |
| | | | | | |
| Depotrenta | 4,5% | 4,5% | 4,5% | 4,5% | 4,5% |

**Lyklatøl**

| | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Lykatøl fyri fíggjarvirksemi** | | | | | |
| Avkast áðrenn avdekning | 3,7% | 0,9% | 6,1% | 2,7% | 7,1% |
| Avkast eftir avdekning | 3,7% | 0,9% | 6,1% | 2,7% | 7,1% |
| | | | | | |
| **Lyklatøl fyri kostnaðir og váða** | | | | | |
| Kostnaðir í prosent av tryggingargjøldum | 18,6% | 18,5% | 19,9% | 17,0% | 27,9% |
| Kostnaðir í prosent av avsetingum | 0,4% | 0,4% | 0,5% | 0,4% | 0,8% |
| Kostnaðir fyri hvønn tryggjaða | 1.425 kr. | 1.613 kr. | 1.678 kr. | 1.489 kr. | 2.722 kr. |
| Kostnaðarúrslit | -0,1% | -0,2% | -0,2% | -0,1% | -0,5% |
| Váðaúrslit | 0,8% | 0,8% | 0,8% | 0,8% | 0,8% |
| **Lyklatøl fyri konsolidering** | | | | | |
| Bonusstig | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% |
| Kundaognarstig | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% |
| Eigarakapitalstig | -49,8% | -44,4% | -50,3% | -25,7% | -41,8% |
| **Lyklatøl fyri renting** | | | | | |
| Renting av eginogn áðrenn skatt | -14,7% | 13,5% | -64,4% | 149,0% | -63,5% |
| Renting av eginogn eftir skatt | -14,6% | 13,7% | -64,4% | 141,7% | -63,5% |
| Renting av kundamiðlum eftir kostnaðir áðrenn skatt | 2,2% | 2,3% | 21,2% | -10,5% | 14,0% |

# Seinastu 5 árini

**Høvuðstøl (t.DKK) - móðurfelag**

| | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | | | | | |
| Tryggingargjøld | 38.939 | 44.538 | 42.095 | 48.960 | 53.474 |
| Útgoldnar veitingar | -106.145 | -98.370 | -111.714 | -76.089 | -142.258 |
| Úrslit av íløguvirksemi | 72.802 | 28.466 | 122.767 | 63.240 | 161.638 |
| Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi | -7.868 | -8.923 | -9.499 | -8.621 | -16.071 |
| Úrslit av endurtrygging | -477 | -2.665 | -1.771 | -528 | -1.494 |
| Tryggingartekniskt úrslit | -114.397 | 110.100 | -444.989 | 348.056 | -245.581 |
| Ársúrslit | -112.968 | 98.864 | -500.232 | 310.069 | -237.560 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur tilsamans | 3.101.968 | 2.988.533 | 3.124.801 | 2.574.770 | 2.882.194 |
| Eginogn tilsamans | -1.025.347 | -912.379 | -1.027.171 | -526.940 | -837.009 |
| Aktiv tilsamans | 2.094.418 | 2.082.351 | 2.105.112 | 2.083.557 | 2.072.035 |
| | | | | | |
| Depotrenta | 4,5% | 4,5% | 4,5% | 4,5% | 4,5% |

**Lyklatøl**

| | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Lykatøl fyri fíggjarvirksemi** | | | | | |
| Avkast áðrenn avdekning | 3,6% | 1,4% | 5,4% | 3,1% | 8,4% |
| Avkast eftir avdekning | 3,6% | 1,4% | 5,4% | 3,1% | 8,4% |
| **Lyklatøl fyri kostnaðir og váða** | | | | | |
| Kostnaðir í prosent av tryggingargjøldum | 18,6% | 18,5% | 19,9% | 17,0% | 27,9% |
| Kostnaðir í prosent av avsetingum | 0,4% | 0,4% | 0,5% | 0,4% | 0,8% |
| Kostnaðir fyri hvønn tryggjaða | 1.503 kr. | 1.701 kr. | 1.678 kr. | 1.387 kr. | 2.540 kr. |
| Kostnaðarúrslit | -0,1% | -0,2% | -0,2% | -0,1% | -0,5% |
| Váðaúrslit | 0,8% | 0,8% | 0,8% | 0,8% | 0,8% |
| **Lyklatøl fyri konsolidering** | | | | | |
| Bonusstig | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% |
| Kundaognarstig | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% |
| Eigarakapitalstig | -49,8% | -44,4% | -50,3% | -25,7% | -41,8% |
| **Lyklatøl fyri renting** | | | | | |
| Renting av eginogn áðrenn skatt | -14,7% | 13,5% | -64,4% | 149,0% | -63,5% |
| Renting av eginogn eftir skatt | -14,6% | 13,7% | -64,4% | 141,7% | -63,5% |
| Renting av kundamiðlum eftir kostnaðir áðrenn skatt | 2,2% | 2,3% | 21,2% | -10,5% | 14,0% |

# Leiðsluátekning

Vit leggja við hesum fram ársfrásøgn fyri felagið og fyri samtakið fyri 2016. Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ásetingarnar í løgtingslóg um P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi og tryggjar, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum, fíggjarligu støðu og av úrslitinum av virkseminum hjá móðurfelag og samtaki.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri aðalfundin, og mælt verður til at góðkenna hana.

Tórshavn, tann 3. apríl 2017

**Stjórn**

Jan Jakobsen
stjóri

**Nevnd**

| | | |
|---|---|---|
| Finn Danberg<br>nevndarformaður | Gunnleyg Árnafjall<br>næstforkvinna | Kári Petersen |

# Átekning frá óheftum grannskoðarum

**Til partaeigararnar í P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag**

## Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2016, við leiðsluátekning, nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn og notum fyri samtakið og fyri móðurfelagið. Ársroknskapurin er gjørdur eftir løgtingslóg um P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársfrásøgnini**

Leiðslan hevur ábyrgd av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til, um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

**Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans**

Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og harumframt eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðanararbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, harundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til, fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av samtaksins og felagsins ognum, skyldum, fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2016 og av úrslitinum av virksemi samtaksins og felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2016 samsvarandi lóg um P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag.

**Ískoytisupplýsingar um onnur viðurskifti**

Uttan at tað ávirkar okkara niðurstøðu, skulu vit gera vart við, at felagið hevur mist sín eginpening. Í frágreiðing um eginogn á síðu 20 vísir leiðslan á, at landskassin veðheldur fyri virksemi felagsins, og víst verður til hesa umrøðu.

# Átekning frá óheftum grannskoðarum

## Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Vit hava lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyri standandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, tann 3. apríl 2017

**Januar**
løggilt grannskoðanarvirki P/F

Hans Laksá
statsaut. revisor

**ALMENT**

Felagið er stovnað við virkna frá 1/1-2012 sum eitt dótturfelag hjá P/F LÍV Holding (fyrr Føroya Lívstrygging). Síðani eru Vinnumálaráðið og Tryggingareftirlitið komin ásamt um, at felagið ikki longur er undir ræði av P/F LÍV Holding, men at felagið verður skilt frá LÍV-samtakinum sum eitt avviklingsfelag.

Ársfrásøgnin er gjørd sambært viðtøkum felagsins og í samsvar við ásetingarnar í løgtingslóg um P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag og í kunngerð nr. 2 frá 30/12-2009 við seinni broytingum um ársfrásagnir frá Tryggingareftirlitinum.

**Alment um innrokning og máting í ársfrásøgn felagsins**

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar so hvørt, sum tær verða forvunnar, harundir virðisjavningar av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis innroknaðar allar útreiðslur – harundir tryggingarveitingar, broytingar í avsetingum og broytingar í bonus – so hvørt hesar verða staðfestar.

Í fíggjarstøðuni verða ognir innroknaðar, tá tað er sannlíkt, at framtíðar fíggjarligir fyrimunir fara at koma felagnum til góðar, og virði á ognini verður mett álítandi. Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá hesar eru sannlíkar og kunnu mátast álítandi. Ogn og skuld verða innroknað til kostprís, og eftir hetta verður hvør roknskaparpostur viðgjørdur, sum lýst niðanfyri.

Við innrokning og máting verður fyrilit tikið fyri væntaðum tapi og váðum, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum kunnu sanna ella avsanna viðurskifti, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

**Avrunding av upphæddum**

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

**Umrokning av útlendskum gjaldoyra og kurstryggjan**

Ársfrásøgnin er í donskum krónum. Transaktiónir í útlendskum gjaldoyra verða støðugt umroknaðar til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á transaktiónsdegnum.

Áogn, skuld og aðrir moneterir postar í útlendskum gjaldoyra verða umroknaðir til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni. Staðfestur og ikki staðfestur vinningur ella tap av umrokning av útlendskum gjaldoyra verður innroknað í rakstrarroknskapin undir íløguvirksemi.

**SAMTØKUROKNSKAPUR**

Samtøkuroknskapurin fevnir um móðurfelagið og dótturfeløgini P/F Royndin og P/F Fastogn, hvørs ársfrásagnir eru grundaðar á sama roknskaparhátt, sum tann hjá móðurfelagnum.

Í samtøkuroknskapinum verða grannskoðaðar ársfrásagnir fyri móðurfelag og dótturfeløg konsolideraðar, og konserninnanhýsis inntøkur og útreiðslur, partabrævaognir, millumverandi, vinningsbýti umframt innanhýsis vinningur og tap av støðisognum verður eliminerað.

**RAKSTRARÚRSLIT 2016**

Felagið hevur býtt rakstrarúrslitið eftir hini sonevndu kontributiónsmeginregluni, sum í stuttum merkir, at tey, ið eru við til at skapa úrslitið, fáa sín lut í tí.

Úrslitið fyri 2016 er býtt eftir nevndu meginreglum, sum fyri 2016 merkir, at alt úrslitið er flutt til eginognina.

**RAKSTRARROKNSKAPUR**

**Tryggingargjøld**

Tryggingargjøld og innskot verða innroknað í rakstrarroknskapin á skrásettum gjaldkomudegi. Endurtryggjarans partur av tryggingargjøldum verður drigin frá.

**Úrslit av íløguvirksemi**

Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. fevna um ársins rentuinntøkur av innlánum, virðisbrøvum og útlánum og vinningsbýti av kapitalpørtum. Virðisjavningar fevna um ársins virðisjavningar av virðisbrøvum og útlánum.

Tann partur av fyrisitingarkostnaði felagsins, sum hevur beinleiðis tilknýti til íløguvirksemið, verður innroknaður sum fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi.

**Tryggingarveitingar**

Innroknað sum tryggingarveitingar verða goldnar veitingar, endurgoldið frá endurtryggingum, broyting í avsetingum til endurgjøld og broyting í endurtryggjaranna parti av avsetingum til endurgjøld.

**Bonus**

Broyting í kollektivum bonuspotentiali er tann partur av tí staðfesta rakstrarúrslitinum eftir rentutilskriving v.m., sum verður tilskrivaður ella skuldskrivaður tryggingarmongdini sum óbýtt avseting. Um parturin av staðfestum úrsliti hjá tryggingarmongdini er negativur, fevnir posturin um nýtslu av kollektivum bonuspotentiali, sum er avsett undanfarin ár.

**Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi**

Felagið hevur felags fyrisiting við P/F LÍV Holding og tess dótturfeløg, og fyrisitingarkostnaðir verða býttir sambært skrivligari avtalu. Hesir kostnaðir fevna um kostnaðir í sambandi við útveganir og fyrisiting av tryggingarmongdini íroknað kostnaðir, ið hava samband við útgjøld av veitingum.

**Flutt úrslit av íløguvirksemi**

Tann partur av úrsliti av íløguvirksemi, sum viðvíkur eginognini, verður innroknaður í henda postin. Tað eru ikki ávísar íløguognir knýttar at eginognini, og tí verður parturin hjá eginognini roknaður út sum ein lutfalsligur partur av samlaða úrslitinum.

**Skattur**

Skattur av ársúrslitinum, sum fevnir um aktuellan skatt fyri árið umframt broytingar í útsettum skatti, verður innroknaður í rakstrarroknskapin við tí parti, sum viðvíkur ársúrslitinum. Skattur viðvíkjandi møguligum bókingum beinleiðis á eginognina verður innroknaður á eginognina.

Tann skattur, sum verður førdur í rakstrarroknskapin, verður flokkaður sum ávikavist skattur av vanligum rakstri og skattur av óvanligum postum.

Møgulig broyting í útsettum skatti vegna broytt skattaprosent, verður innroknað í rakstrarroknskapin.

Felagið er samskattað við P/F LÍV Holding og tess dótturfeløg umframt P/F Royndina. P/F LÍV Holding rindar samanlagda skattin fyri samskattaðu feløgini.

Tryggingarmongdin hjá felagnum eigur eitt stórt skattligt hall frá undanfarnum árum, sum liggur í P/F LÍV Holding. Gagnnýtsla av hesum halli av øðrum samskattaðum feløgum verður afturgoldin af P/F LÍV Holding, deils sum hækking av partapeningi í felagnum og deils sum kontant samsýning.

Í sambandi við skattliga viðgerð av virðisbrøvum nýtir felagið hitt sonevnda lagurprinsippið, sum m.a. hevur við sær, at allir kursmunir – staðfestir og óstaðfestir – verða taldir við í skattskyldugu inntøkuna.

**FÍGGJARSTØÐA**

**Íløguognir**

Íløgubygningar verða virðisásettir til dagsvirði, og virðisjavnan verður gjørd yvir virðisjavningar í rakstrarroknskapinum.

